*Vesturheimurin hevur einki ímóti, at Iran kemur inn í kjarnorkuøldina. Men Vesturheimurin vil ikki hava iranar at ríka uran*

*Hans Blix, vápnaeftirlitsmaður*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800 FAX 341801

# ÚTLAND

# Belgiskar smágentur horvnar

**Løgreglan heldur seg hava funnið burturflytaran, men genturnar eru ikki at finna.**

**BURTURFLYTING**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*





*Stacy Lemmens og Nathalie Mahy hvurvu tann 10. juni, og síðani hevur eingin borið eyga við tær.*

Løgreglan er sannførd um, at tað var Abdallah Aid Oud, sum burturflutti ta sjey ára gomlu Stacy Lemmens og ta tíggju ára gomlu Nathalie Mahy í næstsíðstu viku. Tað heldur dómsvaldið eisini, og tí hevur rætturin í býnum Liége gjørt av, at maðurin skal sita í varðhaldinum fjúrtan dagar afturat.

Myndugleikarnir hava sett fleiri løgreglumenn at leita eftir teimum báðum horvnu gentunum, og um vikuskiftið vóru pápi Stacy og mamma Nathalie til avhoyringar í fleiri tímar hvør sær. Tær báðar genturnar hvurvu tann 10. juni, eftir at tær høvdu spælt uttan fyri eitt vertshús í Liége.

Abdallah Aid Oud slapp leysur úr einum belgiskum fongsli í desember í fjør, har hann hevði sitið, tí hann hevði neyðtikið eina unga gentu. Løgreglan hevur fingið at vita, at hann var nærhendis vertshúsinum í Liége tann dagin, tær báðar genturnar hvurvu, og tí bleiv hann tikin. Men Abdallah sýtir fyri at hava burturflutt tær báðar.

Í gjár leitaðu løgreglumenn í einum gomlum námi nærhendis Liége, men til fánýtis, og kavarar, sum leitaðu í ánni Meuse, ið rennur ígjøgnum býin, funnu heldur einki.

– Vit hava eingi spor at ganga eftir, viðgongur talsmaðurin hjá løgregluni, Alain Remue, fyri AP.



*Hans Blix heldur ikki, at Iran ætlar at gera kjarnorkuvápn, men tað kann broytast, sigur hann.*

# Iran kann gera kjarnorkubumbu um fýra ár

**Tað heldur Hans Blix, sum var leiðari hjá vápnaeftirlitsmonnunum í Irak.**

**IRAN**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hans Blix sigur, at sleppur Iran at ríka nóg mikið av urani tey næstu árini, verður landið ført fyri at gera sína fyrstu kjarnorkubumbu innan 2010. Hann heldur kortini ikki, at teir iransku leiðararnir veruliga ætla at gera eina kjarnorkubumbu, men leggur afturat:

– Tað kann broytast.

Teir fimm føstu limirnir í ST-trygdarráðnum hava saman við Týsklandi latið iranska stýrinum eitt uppskot um, hvussu stríðið um landsins kjarnorkuætlan kann loysast, men enn hevur Teheran ikki svarað. Sambært uppskotinum hjá teimum seks londunum skal Iran sleppa ætlanini at ríka uran, men higartil hevur iranska stýrið hildið uppá, at landið hevur rætt til at ríka uran.

Hans Blix sigur við AP-tíðindastovuna, at sjálvt um tey flestu londini geva iranum rætt í, at teir hava rætt til at byggja kjarnorkuverk til orkuframleiðslu, so fer Vesturheimurin framvegis at seta seg upp ímóti teimum iransku ætlanunum.

– Vesturheimurin hevur einki ímóti, at Iran kemur inn í kjarnorkuøldina. Men Vesturheimurin vil ikki hava iranar at ríka uran, tí tað fer at økja spenningin í Miðeystri. Tí vil Vesturheimurin heldur hava Iran at keypa uran uttanlands, sigur tann royndi svenski diplomaturin.

# Fann eina bjørn í køkinum

Ein kvinna í Kanada gjørdist ikki sørt kløkk, tá hon nú um dagarnar kom til hús, tí inni í køkinum stóð ein bjørn og át. Kvinnan leyp á dyr og kvikaði sær at ringja til løgregluna. Nakrir løgreglumenn vóru skjótir á staðið, men bjørnin tóktist ikki geva sær stórvegis far um teir.

– Bjørnin var komin inn ígjøgnum eina skjótihurð, men hon stóð so friðarlig og át, at vit lótu hana eta seg metta. Síðani lótu vit hana fara útaftur og inn í skógin stutt frá húsunum hjá kvinnuni, sigur Paul Skelton hjá løgregluni í býnum Vancouver.

Løgreglan í Vancouver sigur, at tað er vorðið rættiliga vanligt, at bjarnir taka seg fram at bygdum og býum. Tann eina dagin í síðstu viku fekk løgreglan ikki færri enn seks fráboðanir frá fólki, sum høvdu sæð bjarnir stutt frá húsunum.

**STUTT SAGT**

## Vil hava tjóðarhirðina til New Orleans

Fólk í amerikanska býnum New Orleans eru skelkað, eftir at fimm unglingar vórðu skotnir mitt í býnum seinasta vikuskiftið, og tey krevja, at býarmyndugleikarnir taka stig til at gera tað trygt at ganga í gøtunum.

Ray Nagin, borgarstjóri, hevur svarað, at hann fer at gera alt fyri at gera býin tryggan, og hann hevur tí biðið landsmyndugleikarnar senda menn úr tjóðarhirðini til New Orleans. Tað kann hava við sær, at býurin fær umleið 300 hermen og 60 løgreglumenn adturat sínari egnu løgreglu, skrivar AP.

Skottilburðurin seinasta leygardag var ein tann ringasti í søguni hjá New Orleans. Annars eru morð ikki óvanlig har, og higartil í ár hava 52 fólk latið lív í harðskapi av ymsum slagi.

## Krevja hermann fyri rættin

Italska ákæruvaldið krevur, at amerikanski hermnaðurin, sum skjeyt italska fregnartænastumannin Nícola Calipari í Bagdad í fjør, skal fyri rættin.

Tann 51 ára gamli Calipati bleiv skotin, tá hann skuldi fjala italsku tíðindakvinnuna Giuliana Sgrena, sum júst var sloppin leys frá burturflytarum í irakska høvuðsstaðnum. Tá bilur teirra koyrdi fram við einari amerikanskari eftirlitsstøð, skjeyt ein av amerikonsku hermonnunum eftir honum og rakti Calipati so meint, at hann doyði.

Amerikonsku myndugleikarnir halda uppá, at bilurin koyrdi skjótt, og at italiumenninir høvdu ikki varskógvað amerikanararnar um, at talan var um ein fregnartænastubil. Men italiumenn siga, at bilurin koyrdi spakuliga, og at amerikanska hervaldið hevði fingið at vita, at ein fríaður gísli var í bilinum.

Nú krevur Italia, at tann amerikanski hermaðurin skal fyri rættin, og í Rom verður roknað við, at málið verður tikið upp, sjálvt um hermaðurin ikki kemur hagar. Hann verður ætlandi ákærdur fyri manndráp og kann væntа sær fráverudóm, verður hann funnin sekur, sigur BBC.

## Hugsa um egin áhugamál

Ein frágreiðing um menningarhjálp til tey fátæku londini avdúkar, at tað gerst meiri og meiri vanligt, at gevaralondini hugsa meiri um sína egnu trygd enn um viðurskiftini hjá teimum fátæku og illa støddu.

Í Reality of Aid 2006, sum frágreiðingin eitur, stendur millum annað, at USA brúkar menningarhjálp sum lið í bardaga sínum ímóti yvirgangi, og at ein partur av hjálpini úr Avstralia til Indonesia og Filipsoyggjarnar skal brúkast til ymisk tiltøk, sum kunnu forða yvirgangi.

– Skal stuðul til hernaðarlig mál metast sum menningarhjálp, kann tað skjótt enda við, at tað verður tann minni parturin, sum fer til at hjálpa teimum fátæku. Tað má ikki henda, at menningarhjálp verður brúkt til hernaðarlig endamál, sigur Tony Tujan, sum er leiðari í Reality of Aid, við AP.